Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum

Evni: Uppgerð av kommunuvalúrsliti

Spurningar:

1. Hvat heldur landsstýrismaðurin um, at D'Hondt útrokningarhátturin verður brúktur til uppgerð av kommunuvali ?
2. Um landsstýrismaðurin ikki er nøgdur við hetta, hvørji stig hevur hann so í hyggju at taka?

Viðmerkingar:
Sámal Matras Kristiansen, samfelagsfrøðingur, hevði 14. november grein á netsíðuni hjá Dimmalætting, har hann vísir á, at útrokningarhátturin, sum verður brúktur í samband við kommunuval, men farið er burtur frá til løgtingsval, er til beinleiðis fyrimun fyri størru flokkarnar.

Í Havn merkti útrokningarhátturin til dømis, at størsti flokkurin Tjóðveldi fekk 4 umboð eftir verandi útrokningarhátti, men hevði fingið 3 umboð, um útrokningarhátturin við største brøki varð brúktur.

Hetta gjørdist somuleiðis munurin á, um minni flokkurin Framsókn fekk umboðan ella ikki.

Í Klaksvík gjørdist støðan, sambært samfelagsfrøðinginum, tann sama, har Fólkaflokkurin eftir verandi útrokningarhátti fekk 5 umboð og var líka við at fáa 6, meðan hátturin við største brøki, har allar atkvøður fáa sama virði, hevði givið Fólkaflokkinum 4 umboð, meðan Javnaðarflokkurin hevði komið upp á 2.

Tá hesin spurningur verður reistur í samfelagnum, og spurnartekn harvið verður sett við javna virðið á atkvøðunum, verður mett hóskandi, at avvarðandi landsstýrismaður fyriheldur seg til spurningin.

Á Løgtingi, 15. november 2024

Eirikur í Jákupsstovu